VIKUBLAÐIÐ
ØKEYPIS TIL ØLL HÚSKI Í FØROYUM - SO VITA ØLL TAÐ



Hósdagur 11. Januar 2007 Vika nr. 02



Óla Jákup Rólantsson 11.01.2007 - 09:05

# 2007 verður Harley-ár!

**Fyrstu 2007-sniðini eru komin og nakrar eru longu úti á vegunum.**



Harleysúkklurnar kunnu býtast í 5 "familjur", Sportster, Dyna, Softtail, Touring og V-Rod við tilsamans 38 ymsum sniðum í 24 ymsum litum. Prísirnir í Føroyum liggja millum 114 og 428 túsund. V-Rod familjan fæst í ár í 5 ymsum sniðum frá eini cruisaraútgávu og eini dragstyle til eina reindyrkaða sportssúkklu.

Eftirspurningurin eftir Harleysúkklum er so stórur, at neyðugt er at bíleggja í góðari tíð, um ein ætlar at keypa. Ove Ritter frá HD.fo sigur, at um ein ger skjótt av, so ber til at fáa 2007-sniðini í vár og í summar, men so má ein vera skjótur við bíleggingini. Súkklur og og annað tilfar er at síggja í nýggja og stásiliga handlinum í Jónas Broncksgøtu 33, har eisini lekkur MC-klæðir og trygdarútgerð frá 4BIKERS er at fáa. HD.fo bjóðar tær harumframt eitt stórt úrval av bæði nýggjum og gomlum HD motorsúkklum, umframt service frá dugnaligum mekanikarum.
HD er heimsins størsta motorsúkklufelag við meiri enn eini miljón limum tilsamans. HD-felagið í Føroyum skipar fyri ymsum tiltøkum, vitjanum og útferðum fleiri ferðir um árið. Fyrsta HD - sum var ein skutari við 125 cc - kom til Føroya í 1960 og tann fyrsta Big Twin kom í 1995. Í dag eru um 60 HD-súkklur í Føroyum. 10% av Harleyeigarum, bæði globalt og í Føroyum, eru kvinnur. Áhugin er vaksandi - í fjør komu 25 Harleysúkklur til Føroya, tær flestu nýggjar.
Lesið annars meira á www.hd.fo

nr.fo
Leita

Bigami
- Hvat er revsingin fyri bigami?
- Tvær vermøður...
*Les Meira*

Var tað rætt at avrætta Saddam Hussein?
Ja
Nei
Veit ikki

LEITA I SAVNINUM